gult cyan magenta svart

# Sosialurin

Nr. 26 • mikudagur • 7. februar 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00



Prix Føroyar á Strondum:

## Føroyskar húgvur og technotónleikur

síða 14-15

www.sosialurin.fo



## Torrafiskurin komin

síða 5



Rúna Sivertsen:

## Sjómenn eiga at seta størri krøv

síða 9



## Út í heim at lesa

síða 11



# Fýra ára skiftistíð

**Atkvøða føroyingar »ja« 26. mai verður skiftistíðina fýra ár. Hetta gjørdi forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, púra greitt eftir fundin við Føroyanevndina í gjár**

FÓLKAATKVØÐAN

*Magnus Dam, Keypmannahavn*

Boðini frá danska forsætisráðharranum eftir hálvan annan tíma langa fundin við Føroyanevndina í gjár – týsdagin kl 13 – eru greið. Antin verður samráðst um eina loysn innan fyri ríkisfelagsskapin ella um fullveldi.

Nýggi leisturin hjá landsstýrinum verður av donsku stjórnini fataður sum ein fullveldisleistur, og fólkaatkvøðan 26. mai verður fatað sum ein fólkaatkvøða um loysing. Tí heldur danska stjórnin fast við, at skiftistíðin ikki verður longur enn fýra ár. Hetta er sama útmelding, sum stjórnin kom við eftir fyrsta samráðingarfundin í mars í fjør.

Poul Nyrup Rasmussen ger púra greitt, at danska stjórnin fer at virða fólkaatkvøðuna og úrslitið av henni.

– Vit kenna okkum hinvegin noydd at siga Føroya fólki, hvørji grundsjónarmið okkara eru. Verður úrslitið »ja«, so fara stjórnin og Fólkatingið at vera til reiðar at samráðast við landsstýrið um at broyta heimastýrislógina, so landsstýrið stigvíst kann yvirtaka málsøkini, sum tað ynskir at yvirtaka, sigur Poul Nyrup Rasmussen.

– Vit halda eisini, at tað er rætt at gera vart við, at vit meta fólkaatkvøðuna snúgva seg de facto um loysing, eins og fyrsta samráðingaruppleggið frá landsstýrinum.

– Okkara samráðingargrundarlag, sum er ófrávíkiligt, er ein skiftistíð upp á fýra ár, ger danski forsætisráðharrin greitt.

Poul Nyrup Rasmussen segði, at breið semja er í Fólkatinginum um donsku útmeldingina.

Um føroyingar atkvøða »nei«, so er stjórnin somuleiðis sinnað at endurskoða heimastýrislógina ella at samráðast um nýggja sjálvstýrisskipan.

Danski forsætisráðharrin er ikki samdur við landsstýrinum í, at hetta ikki beinleiðis er ein fólkaatkvøða um loysing.

Óli Breckmann uppfatar danska útspælið sum at føroyingar nú verða tveittir út úr ríkisfelagsskapinum.


COMPAQ
Presario
AMD Duron 700MHz
8xDVD
64MB RAM
10GB Harðdisk
Nvidia 8MB
17" litskermur
Knappaborð og scrollmús
56K Modem
Windows ME
1 ára garanti
Nógv ymisk forrit
13.625,-
COM-DATA P/F
Box 19 FO-700 Klaksvík Tlf. 476173
FO 600 Saltangará Tlf. 449840





Ring bíligari
við GACB
DANMARK
uml. 1,40 kr./min.
Telefar
Tel. 21 33 33 • Tel. 33 33 33
fax 001 208 485 6388
tf@telefar.com





Sp/f VVS-HORNIÐ
Lágpríshandil
Alt innan hitaverk & sanitet so sum:
• Stoypijarnsketil
• Sanitet
• Kranar
• Baðirúmsmøblar
Støkk inn á gólvið ella ring
Landavegur 2 - 100 Tórshavn
Tel. 318023 - Fax 310963





Telduborð til kamari fyri serprís
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60